

# Samkomublaðið fyri febr./mars.

# 2015

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar









www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Páskastevnan 2015

Frank Jacobsen

Les. Matt. 25, 14-31.

Vit kenna øll søguna um talentirnar, og hvussu tveir vunnu dupult av tí, teir høvdu fingið, meðan ein einki hevði vunnið. Harrin gav ikki meir, enn hann visti, at tænararnir megnaðu, og tískil væntaði hann heldur ikki meir.
Tænarin, sum fekk eina talent, fór og gróv hana niður og segði við harra sín, tá ið hann kom aftur: "...hygg, her hevur tú títt." Vit kunnu spyrja, um harri hansara ikki átti at verið nøgdur við, at hann fekk sítt aftur? Trupulleikin lá ikki har. Trupulleikin var tann, at hesin tænarin vanvirdi tað álit, sum harri hansara hevði víst honum. Hann gróv sína talent niður. Hann krógvaði hana. Hann vildi ikki kennast við hana. Hann skammaðist. Hann trúði kanska, at hansara talent var so lítið verd, at hann ikki dugdi og helt tí, at tað var tryggast at krógva tað, hann dugdi.

Harrin kendi tænararnar og viðurkendi, at allir tænararnir ikki høvdu sama førleika. Hann metti um, hvussu nógv teir vóru mentir at umsita og gav teimum ábyrgd hareftir. Hann visti, hvat hann hevði latið teimum og hevði tí eina væntan um at síggja úrslit. Harrin kravdi ikki, at allir tænararnir skuldu gera tað sama, men at teir skuldu arbeiða við tí, sum teimum var litið upp í hendur.

Nú páskastevnan stundar til, havi eg hugsað um ymiskt, sum knýtir seg at henni. Vit ynskja, at menniskju skulu blíva frelst og grødd, og at undur og tekin skulu henda. Tú trýrt kanska, at tað, sum tú hevur, er so lítið vert, at tað ikki kann brúkast til nakað serligt. Men tað lítla, sum tú hevur fingið, er nógv vert fyri Harran. Hann hevur givið tær tað, og Hann veit, at tú kanst fullføra tað, sum hann hevur kallað teg til. Minst til, at harrin segði við hinar báðar tænararnar, sum høvdu fleirfaldað sínar talentir, at teir høvdu verið trúfastir í lítlum. Tað, sum hini hava fingið av talentum, er ikki meir vert enn tað, sum tú hevur fingið.
Grava ikki tína talent niður, men brúka hana til at tæna Harranum. Gleð teg um tær talentir, sum Harrin hevur givið tær og tæn Honum við tí, sum tú hevur.

# Skrá fyri febr./mars.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16. febr. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 17. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 21. febr. | kl. 21.00: | AWAKE við Barbaru Steinkross Joensen |
| Sunnudagur | 22. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Òlavi Jacobsen |
| Mánadagur | 23. febr. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 24. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 28. febr. | kl. 21.00: | AWAKE við Steve & Cindy Seabury<br>Evni: “Profetic Destiny" |
| Sunnudagur | 1. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Steve og Cindy Seabury<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |
| Mánadagur | 2. mars | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 7. mars | kl. 21.00: | AWAKE við Djóna á Boðanesi |
| Sunnudagur | 8. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |
| Mánadagur | 9. mars | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Vágunum |
| Týsdagur | 10. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 14. mars | kl. 21.00: | AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 15. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen |
| Mánadagur | 16. mars | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 17. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 21. mars | kl. 21.00: | AWAKE Helga Abrahamsen |
| Sunnudagur | 22. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sunnivu Poulsen |

# Lýsingar

**Stóra páskastevnan í Kelduni**
Aftur bjóða vit til stóru páskastevnuna í Kelduni. Stevnan verður 2.-6. apríl. Latum okkum gera okkum klár til at tæna landi og fólki okkara.
Á stevnuni fara føroyskir talarar at bera Orðið fram og undirvísa. Pauli Høj, Símun P. Jacobsen, Jastrid Høj, Tummas Jacobsen, Sunniva Poulsen o.fl. fara at tala.
Sangluttøka verður úr fleiri samkomum.
Seminar verður leygardagin 4. apríl. Evnini verða islam og kristnitrúgv og vøksturin og ávirkanin hjá kristnitrúnni heiminum i dag. Høgni Johannesen, gudfrøðingur, og Rúni Rasmussrn, stjórnmál-afrøðingur, fara at halda hvør sín fyrilestur.
Klovnurin Bubu fer at vitja stevnuna!
Í næstum verður kunnað nærri um innihald og annað viðv. páskastevnuni.

**Kom og vaska!**
Vaski- og uppruddingardagar verða á ovastu hædd í skúlabygninginum leygardagarnar 7. og 14. mars. Byrjað verður við morgunmati kl. 9, og vit halda á til kl 16. Døgurði verður eisini at fáa. Vegna matgerð verður neyðugt við tilmelding hjá Alice Frederiksberg, tlf 229857. Vónandi verða vit fleiri, ið koma at hjálpa til hesar dagar.

**Annika og Steven vitja**
Okkara trúboðarar Steven og Annika, sum tæna í Turkalandi, eru komin at vitja. Tey eru heima til 20 apríl.
Tey ynskja at tæna samkomuni. Tey tosa við fólk, kveikja til missión og at luttaka í øllum arbeiði, sum Keldan hevur dagliga. Møguliga, um undirtøka verður fyri tí, so fara tey eisini at undirvísa í drama og hvussu man kann kreativt náa út til menniskju við boðskapinum um Jesus.
Øll vælkomin at bjóða teimum heim ella at vitja tey og fáa samtalu og forbøn. Leif Høj samskipar, so til ber at siga honum frá.

**Steve og Cindy vitja eisini**
Steve og Cindy Seabury (og hjálparfólkið Linda) koma til Føroyar 19. februar og steðga til 9. mars. Tey fara at búgva í Norðragøtu hjá Anniku og Steven. Steve og Cindy eru úr USA og hava verið trúboðarar í 20 ár. Tey hava arbeitt við at stovna kirkjur og við leiðaramenning. Tey hava profetiska tænastu og duga væl at undirvísa og menna onnur í ymiskum tænastum. Tey fara at tala á morgunmøti og á AWAKE.

**English Fellowship**
Saturday March 28th at 4.30pm is English Fellowship held in the kafé in Keldan.
Leygardagin 28. mars  kl. 16.30 verður  English Fellowship í kaféteriuni.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584